Setur tú spurningar við samkomu og samkomulívi? Hevði tú viljað vitað eitt sindur meiri um hvat Bíblian lærir um samkomuna? Hevði tú viljað vitað, hvussu Harrin Jesus ynskir samkomuna at útinna verk Sítt her á jørð? Hevði tú viljað vitað, hvussu samkomulív virkar praktiskt í gerandisdegnum? Leingist tær eftir at verið partur av nøkrum nógv størri og dýrabarari enn tað, tú kennir til her og nú? Leingist tær eftir at síggja samkomuna í 21. øld uppdaga av nýggjum kollveltandi kraftina og kærleikan, sum fyrstu samkomurnar í Nýggja Testamenti høvdu?

„Samkoman – eitt innlit í samkomu Kristusar & samkomulív í 21. øld" hjálpir tær at síggja, at samkoman er ikki ein avoldað losja, ið er týdningarleys og púra óviðkomandi fyri 21. aldar menniskjuna. Nei, samkoman er ein sunn, lívfør og virkin organisma, sum Gud nýtir við Heilaga Andans kraft at útinna arbeiði Sítt á jørð. Nú er tað okkara framíhjárættur og ábyrgd at vera við í hesum arbeiði. Tá ið samkoman ger tað, sum Jesus Kristus hevur kallað hana til, er hon tann mest livandi, viðkomandi, umbroytandi og kollveltandi kraftin á jørðini, sum bókstaviliga fær fólk at reisa seg upp og undrast.

Henda bók gevur tær eitt gott innlit í bíbilska grundarlagið fyri samkomu Kristusar, lív samkomunar, hvat eigur at eyðkenna eina samkomu, ymisk sløg av samkomum, ymisk sløg av menniskjum í samkomunum og hvat tað er, sum ger, at samkomur vaksa ella minka. Í fyrstu bókini í eini røð um samkomu og samkomulív far lesarin vónandi ein longsul eftir at læra meira um undurfullu samkomu Kristusar.

„Samkoman er ikki ein bygningur. Samkoman er ikki eitt stað, har fólk møtast. Samkoman er endurfødd menniskju, sum dagliga liva lív Harrans Jesusar í tí, tey gera, higar, tey fara. Latið okkum tí ikki halda, at vit bert skulu ganga í eini samkomu. Nei, latið okkum vera samkoman!"

*Bridged Willard*

---



Jógvan Zachariassen er føddur á Tvøroyri 1967 og vaks upp í Hvalba og Gøtu. Hann fekk einleikaraprógv sum fagottleikari frá hægri tónlistarskúlanum í Reykjavík í 1989. Gjørdist BA í bíbliuvísindi frá Emmaus Bible College í USA í 1994 og cand. theol. (Th.M) frá Dallas Theological Seminary í Texas í USA í 1997.

Frá 1997 til 2000 starvaðist Jógvan sum leiðari og lærari á Tilsley Bible College í Motherwell í Skotlandi. Hann er nú samkomuleiðari í Lívdini í Hoyvík. Jógvan ferðast nógv sum talari og lærari í ymiskum londum kring heimin.

Røddin hjá Jógvani er kend frá sendingunum "Orð á Leiðini" á Rás 2 og "Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna" á Lindini.

Tá ið til ber, leikar hann á fagott í tónleikabólkinum Aldubáruni og Føroya Symfoniorkestri. Hann hevur givið út tvær solofløgur á fagottini við sálmum og sangum – "Making Melody" og "Faith".

Jógvan býr í Hoyvík saman við konu síni Unn og børnunum Hjørdis, Jósefi og Karitu Mariu. Jógvani dámar sera væl turt tvøst og spik og annars allan føroyskan mat. Eitt kvøld um vikuna tekur hann sær av løttum og spælir innandura fótbólt saman við vinum sínum.

SAMKOMAN

Jógvan Zachariassen

1. bind

JÓGVAN ZACHARIASSEN

# SAMKOMAN

## Eitt innlit í samkomu Kristusar & samkomlív í 21. øld

*1. bind*

**Jógvan Zachariassen**